umhvørvisstovan

# Vegleiðing um óljóð

**Henda vegleiðing fyri óljóð frá vinnuligum virksemi og frítíðarvirksemi er ætlað kommunum, og er galdandi fyri virksemi, ið kommunur hava eftirlit við.**

## Virksemi undir kommunalum eftirliti

Kommunan hevur eftirlit við øllum virksemi, sum ikki er serliga dálkandi sambært kapittul 5 í Umhvørvisverndarlógini[1].

Vinnuligt virksemi og frítíðarvirksemi skal fara fram soleiðis, at tað ikki hevur við sær ampar av óljóði, íroknað lág- ella háfrekventum óljóði, ristingum, ljósi ella geislingum. Elvir vinnuligt virksemi ella frítíðarvirksemi til ampa av óljóði, kann bý- ella bygdarráð sambært grein 8 í kunngerð um umhvørvisreglur[2] geva boð um at seta neyðug tiltøk í verk til at fyribyrgja ampum, t.d. við at seta avmarkingar fyri, nær virksemið kann fara fram. Ber ikki til at avmarka amparnar, kann bý- ella bygdarráðið seta forboð fyri virkseminum.

Dømi um virksemi, sum kommunan hevur eftirlit við og har trupulleikar kunnu vera við óljóði, eru skip, sum liggja við kei, virkir, ferðsla á vinnuøkjum, óljóð frá ítróttarøkjum og óljóð frá vertshúsum.

Á heimasíðuni hjá Umhvørvisstovuni www.us.fo ber til at síggja dømi um ætlanarskriv og skriv við boðum, sum kunnu nýtast sum fyrimynd, tá kommunan skal orða brøv til virki ella borgara í kommununi, t.d. tá boð skulu gevast um eitthvørt.

## Hvat er óljóð?

Óljóð er óynskt ljóð, sum t.d. kemur frá ferðslu, virkjum ella frítíðarvirksemi. Óljóð kann sambært Altjóða heilsustovninum WHO millum annað elva til høvuðpínu og andvekur.

Stórur munur er á óljóði, og hvussu nógvan ampa fólk fáa av óljóði. Ampin av óljóði er ikki einans tengdur at óljóðsstyrkini, men eisini at faktorum sum slag av óljóði, hvussu tað broytist við tíðini og um tónar eru í óljóðinum. Óljóð, sum inniheldur tónar, t.d. ventilatorar ella elmotorar, ella óljóð, sum inniheldur impulsar, t.d. bankiljóð ella trýstluft, kennist serliga órógvandi. Einstaklingsbundin viðurskifti hava eisini týdning, sum t.d. hvønn hugburð persónurin hevur til óljóðskelduna.

---

[1] Løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 128 frá 22. desember 2008.

[2] Kunngerð nr. 53 frá 3. mai 1994 um umhvørvisreglur, sum seinast broytt við kunngerð nr. 111 frá 7. september 2009.

umhvørvisstovan · Traðagøta 38 · Postboks 2048 · FO-165 Argir · Tlf: +298 34 24 00 · Fax: +298 34 24 01· us@us.fo · www.us.fo

umhvørvisstovan

## Vegleiðandi markvirði fyri óljóð

Umhvørvisstovan mælir til, at óljóð frá vinnuligum virksemi og frítíðarvirksemi ikki fer upp um virðini í talvu 1.

**Talva 1:** Vegleiðandi markvirði fyri óljóð - dB(A)

| | **mán. - frí. kl. 07 - 18**<br>**leyg. kl. 07 - 14** | **mán. - frí. kl. 18 - 22**<br>**leyg. kl. 14 - 22**<br>**sunnu- og halgidagar kl. 07 - 22** | **Allar dagar**<br>**kl. 22 - 07** |
|---|---|---|---|
| **Øki 1:** Vinnuøki, har larmandi virksemi kann fara fram | 70 dB(A) | 70 dB(A) | 70 dB(A) |
| **Øki 2:** Vinnuøki, har minni larmandi virksemi kann fara fram | 60 dB(A) | 60 dB(A) | 60 dB(A) |
| **Øki 3:** Blandað bústaðar- og miðstaðarøki | 55 dB(A) | 45 dB(A) | 40 dB(A) |
| **Øki 4:** Bústaðarøki | 45 dB(A) | 40 dB(A) | 35 dB(A) |

Varsemi skal takast til óljóð, sum er sett saman av sera lágfrekventum óljóði (frekvensum undir 50 Hz) av tí at dB(A)-metingin ikki tekur nøktandi fyrilit fyri sovorðnum óljóði.

Vegleiðandi markvirðini í talvu 1 eru galdandi fyri óljóðsávirkanina á umhvørvið (immissiónina), og ikki tað óljóð, sum kemur frá virkseminum (emissiónina). Tað skal skiljast soleiðis, at ein fyritøka, sum t.d. er staðsett í øki 1 kann elva til óljóð upp til 70 dB(A) í vinnuøki (øki 1) í vanligari arbeiðstíð, men samstundis í mesta lagi 45 dB(A) í nærmasta bústaðarøki (øki 4). Ein fyritøka skal sostatt halda markvirðini, sum eru galdandi fyri tað øki, har tað er staðsett, og markvirðini, sum eru galdandi í økjunum rundanum. Um vinnuøki markar til bústaðarøki, má larmandi virksemi staðsetast soleiðis, at tað ikki elvir til meira óljóð í bústaðarøkinum enn ásett í talvu 1. Tað er tí av stórum týdningi, at kommunan í síni byggisamtykt tekur hædd fyri staðseting av vinnu- og bústaðarøkjum, og hvønn ampa vinnuligt virksemi kann hava á bústaðarøki.

## Kanningar av óljóði

Óljóðsmátingar eiga at verða framdar av góðkendari starvsstovu, og verða framdar við óljóðskeldurnar frá virkseminum. Óljóðsávirkanin frá virkseminum skal so roknast út við spjaðingsútrokningum, sum taka hædd fyri, hvussu óljóðið spjaðist í umhvørvinum.

Óljóðsmátingar, ið eru gjørdar uttan fyri økið, har virksemið er staðsett, kunnu sjáldan nýtast til at staðfesta, um viðkomandi virksemi veruliga elvir til óljóð omanfyri vegleiðandi markvirði. Hetta tí at tað ofta eru fleiri óljóðskeldur at taka hædd fyri. Ein slík kanning kann tó staðfesta, um óljóðið í tí øki, har óljóðsmátingin er gjørd, er omanfyri ásettu markvirði, og leggja støði undir einari víðari kortlegging av óljóðinum.

umhvørvisstovan · Traðagøta 38 · Postboks 2048 · FO-165 Argir · Tlf: +298 34 24 00 · Fax: +298 34 24 01· us@us.fo · www.us.fo